# Óli Hammer leggur frá sær

**Smyril Line skal hava nýggjan stjóra. Óli Hammer leggur frá sær, og samráðingar eru í gongd við eitt nýtt stjóraevni, sigur nevndarformaðurin**

STJÓRASKIFTI
*Edvard Joensen*



*Óli Hammer leggur frá sær eftir at hava verið stjóri á Smyril Line í góð 22 ár*

Óli Hammer leggur frá sær eftir góð 22 ár sum stjóri í Smyril Line. Samráðingar eru millum nevndina og eitt nýtt stjóraevni, sigur nevndaformaðurin í Smyril Line, Klæmint Weihe.

– Stundin er komin at lata yngri kreftir sleppa framat. Eg havi verið stjóri í Smyril Line í meira enn 22 spennandi ár. Tá vit telja árini sum skipari á Smyrli við, so havi eg tikist við ferðafólka- og farmaflutning á Norðuratlantshavinum í meira enn 30 ár, og nú er tíð at fara, sigur Óli Hammer í tíðindaskrivi, sum hann saman við nevndarformanninum í Smyril Line sendi fjølmiðlunum hósmorgunin.

Spurdur um stjórin er trýstur úr starvinum orsakað av støðuni, Smyril Line í seinastuni hvur verið í, svarar nevndarformaðurin, Klæmint Weihe, at tað, sum stendur í tíðindaskrivinum er tað, sum partarnir eru komnir á samt um, og einki annað verður sagt um tað.

Óli Hammer hevur verið ímyndin av Smyril Line, síðan hann í 1982 saman við øðrum tók stig til at stovna felagið. Smyril Line varð stovnað 1. november 1982 við Óla Hammer sum stjóra. Undan tí var Óli Hammer skipari á Smyrli, sum var byrjanin til ta ferðafólkarutuna, ið Norröna, síðan hon kom, hevur røkt.

Óli Hammer leggur fá sær, samstundis, sum vissa er fingin fyri, at tað framvegis fer at standa Tórshavn, og at Merkið fer at veitra á reyvini á Norrönu.

Nevndin í Smyril Line og Óli Hammer, fráfarandi stjóri, siga, at tey eru samd um, at løtan nú er tann rætta til stjóraskiftið.

Hóast Óli Hammer nú leggur frá sær sum stjóri, fer hann framhaldandi at virka sum ráðgevi hjá felagnum, tað, sum eftir er av hesum árinum.

# Norröna verður verandi føroysk

**So er tað avgjørt. Føroyingar eiga framhaldandi partabrævameirilutan í Smyril Line, og ætlaða avtalan við Fjord Line um at stovna nýtt ferjufelag, er slept**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*




*Tað man lætta hjá nógvum at frætta, at Norröna framhaldandi fer at sigla við Merkinum á reyvini*

Framtaksgrunnurin er størsti partaeigarin í Smyril Line. Tað er greitt, eftir at íslendskia Austfar, føroyski Framtakgrunnurin og Tryggingarfelagið Føroyar hava játtað at seta tilsamans 60 milliónir krónur í nýggjum partapeningin í Smyril Line.

Samstundis boðar nevndin í Smyril Line, frá, at ætlaða avtalan við Fjord Line um at stovna ferjufelagið North Atlantic Line verður av ongum. Tó fara feløgini framhaldandi at samstarva á ymsum økjum, sum hava við vinnuna at gera, sigur Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line.

Í staðin er Smyril Line í samráðingum við stóra flutningsfelagið Blue Water, sum arbeiðir rættiliga víða um í Europa, um at stovna eitt felags farmafelag. Tann avtalan við at koma undir land og verður væntandi klár tann fyrsta apríl, sigur Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line.

Smyril Line fer at hava Norrönum sum siglandi partin av flutningskervinum hjá nýggja felagnum. Blue Water hevur rættiliga væl útbygt flutningskervi á landi. Feløgini fara at eiga hvør sína helvt av partapeninginum í nýggja flutningsfelagnum.

Við nýggju avtaluni um partapening tykist avgerðarætturin enn tryggari heima aftur í Føroyum. Framtaksgrunnurin, sum nú er størsti einstaki partaeigarin, eigur nú saman við Tryggingarfelagnum Føroyar og íslendska Austfar 62 prosent av samlaða partapeninginum í felagnum. Hetlendski menningargrunnurin, sum undan hesi avtaluni var størsti einstaki partaeigarin við góðum 30 prosentum av partapeninginum, eigur nú 20 prosent av partapeninginum. Hini 18 prosentini eiga aðrir smæri partaeigarar.